**Røða forseta Íslands,**
**Ólafs Ragnars Grímssonar,**
**í løgmansveitslu 28. juni 2001**

Háttvirdi Løgmaður
og aðrir góðir gestir

Oyggjarnar rísa úr havi sum duldarfult ævintýr. Grasið veksur grønt í himmalhøgum bergi, tindar og víkir, vágir og firðir vevja landslagið saman í eitt undurverk. Sólin og mjørkin leika í løttum dansi; eitt tigandi stev kemur týðiliga undan kavi.

Soleiðis er myndin í huga okkara: Føroyar, ein varði í Atlantshavinum; náttúran og menniskjað sum eitt treisknistekin á úthavsvíddum.

Sum Ísland vóru oyggjar tykkara kortini eitt ókent land í ártúsundir. Fyri borgum ráddi fuglur og fiskur, og aldan breyt ímóti berginum í samljóði við ovurmegi skapanarverksins. Øldir gingu, áðrenn frælslyntir menn settu búgv her á leiðini, og síðani hava íslendingar og føroyingar sungið sama stev í samljóði við skiftandi árstíðir og fjølbroytta náttúru, fjøllini, havið og náttúruna sum heild.

Ein íslendingur og ein føroyingur verða rámandi lýstir við orðinum náttúrubarn. Vit vita, at veðurlagið er karmur um lagnu okkara, at havið er bæði gávumilt og harðrent. Sjómenn okkara hava sett lívið í váða, havið goymir nógvar teirra, og sorgin nívir skyldfólk og vinir, ið bíðaðu við hús.

Tað vóru knotur í tí fólkaslagi, ið bygdi lond okkara av fyrstantíð, og enn kann Norðurhavslívið vera ein braneggjaður bardagi.

Í tílíkum førum leita vit aftur í fornsøgur, kvæði og skaldskap, arvakynstrið, har bæði kveiking og kelda til valaverk er at finna.

Felgasarvur føroyinga og íslendinga er knýttur at fólkinum, sum her setti búgv, og sæst aftur í frásøgum um fornu hendingarnar í gomlum skinnbókum. Snorri Sturluson, megnarskald Íslands og Norðurlanda, sigur í tí stóra sagnaritinum Heimskringlu: “Í hesum ófriðartíðum, tá ið Haraldur legði Noreg undir seg, nomu norðmenn eisini land vestur í havi: Føroyar og

Ísland”. Dugandi menn og megnarkvinnur rýmdu undan bardagfúsa einaræðisharranum, Haraldi hinum hárfagra, og løgdu lunnar undir eitt samfelag í Føroyum og í Íslandi, har lóg og rættur vóru í hásæti og frælsir menn samstarvaðu á sínum egna tingi. Føroya Løgting og Alþingið í Íslandi festu rót, og fyrsta kapitlið í Føroyingasøgu vísir væl, hvussu tætt bondini vóru millum hesi bæði samfeløgini longu av fyrstantíð. Har verður skrivað:

“Eyður hin firndarríka fór til Íslands, men bar við í Føroyum og gifti burtur har Óluvu, dóttur Torsteins reyða, og haðani er komið hitt víðagitnasta ættarlið Føroyinganna, sum teir kalla Gøtuskeggjar, ið búði í Eysturoy.”

Tann stóra hetjan í Føroyingasøgu er Tróndur í Gøtu, sum hvørki vildi lúta fyri kongi ella kristni; hann læt seg tó kristna umsíðir, men var annars ikki til at vika, tá ið tað snúði seg um at verja føroysk áhugamál. Navn hansara livir í íslendskum orðafelli og enn sipa íslendingar dagliga til Trónd í Gøtu, tá ið vit tosa um tann, ið ikki vil bakka ein tumma, hóast herjað verður á.

Tjóðir okkara hava altíð sett mál sítt og mentan, søgur og yrkingar í hásæti, og hetta er kjarnin í sjálvsímynd okkara og tjóðarsamleika. Íslendingar hava tó altíð verið harmir um, at dansurin, sum tit hava varðveitt so væl, hvarv úr mentan okkara. Vit mugu koma henda vegin fyri at treða hann saman við tykkum, og her í Kirkjubø verða vit mint á, hvussu tit fram um okkum hava bygt og varðveitt stórbær hús, ið knýta bond aftur í øldir.

Felagsleið okkara er merkisverd. Hon er bæði ein dragandi arvamegi og samstundis ein eggjan til at inna verk okkara enn betur í framtíðini.

Fyri rívliga hundrað árum síðani stóð ein grein eftir J.P.Gregoriussen í Føroyingatíðindum. Har skrivar hann um eina gudstænastu í Bessastaðakirkju, staðnum har Forseti Íslands seinni fekk bústað. Gregoriussen, sum eisini varð nevndur Jóan Petur uppi í Trøð, greiðir har frá, hvussu stóra ávirkan tað íslendska málið hevði á hann, og hann helt seg hoyra sítt egna móðurmál runga í kirkjuni. Síðani heldur hann áfram:

“Alt var so kent, bæði tá ið deknurin trein fram og las bønina: “Látum oss biðja”, og tá ið eitt kór við tjúgu sangarum sang sálmin: “Heiður sé guði himnum á””.

Íslendsk skøld hava verið hugtikin av Føroyum í øldir, og Hannes Hafstein, sum var tann fyrsti íslendski ráðharrin, yrkti sera vakurt um Klaksvíkina:

“Tindrar úr tindum snær,
tó milli kletta grær.
Niðrundan brosir bær,
brekkan í ljósi hlær.

Fjallgirða fagra vík
fósturlands stöðvun lík,
vorsólin veki þig
vorblómin þeki þig.

Jón Helgason, oddamaðurin í íslendskum fornhandritarannsóknum í øldini, ið júst er farin aftur um bak, var hugtikin av føroysku tjóðini og hevði hug at styrkja bondini tjóðanna millum. Hann skrivaði í 1919 ritgerð um tað føroyska málið í Skírni, elsta íslendska tíðarritinum og elsta norðurlendska tíðarritinum. Har kemur hann við einari nágreiniligari arbeiðsætlan, sum so sanniliga er tíðarhóskandi í dag, nú vit feta inn í ta ein og tjúgundu øldina við lyftum um enn tættari samstarv.

Vit kundu nýtt alt kvøldið til at sagt frá søgu okkara og greiða frá fólki av íslendskari og føroyskari ætt, sum staðið hevur á odda í vinnulívi og samfelagsmálum.  Lagna okkara er so samanvovin, at mangan eru vit eins og eitt húski, ein sjómansfamilja, ið hevur evnað eitt framkomið samfelag úr stavnhaldi okkar í øldir, tilfeingi havsins.

At verja fiskastovnarnar í Norður-Atlantshavi og gagnnýta teir við skynsemi í hesari øldini er felagsáhugamál føroyinga og íslendinga. Fiskivinnusamstarvið okkara millum hevur givið góðar royndir og er eitt fyrimyndarligt dømi um, hvussu til ber at loysa trupulleikar á hepnan hátt.

Vit hava víst, at lítil oyggjalond kunnu nýta treysti fólksins og ríkidømi havsins til at skapa trygt lívsgrundarlag, vælferð og framgongd. Á henda hátt hava vit ásannað, at tað lítla samfelagið so sanniliga hevur sínar fyrimunir.

Saman við vinum okkara í Grønlandi kunnu vit fegnast um, at formligt samstarv tjóðartinganna í hesum trimum londunum og haraftrat regluligt samráð millum útinnandi leiðararnar, ið júst er fingið í lag, hevur ført við sær ymiskar umbøtur og framstig fyri øll tey trý norðuratlantisku londini

Samstarvið millum føroyingar, íslendingar og grønlendingar verður enn meira umráðandi í komandi tíðum, tí her norðuri eru fleiri verkevni fyri stavn. Haraftrat økist í heilum samskiftið millum lond á einum øki, ið røkkur úr Eystur-Kanada til Grønlands, Íslands, Føroya, Skotlands, yvir til hini Norðurlondini og inn í Vestur-Russland. Nógv av teimum týdningarmestu altjóðasamstarvsverkevnunum nú á døgum eru tengd at leiðini her norðuri, eitt nú lívfrøðivernd og týðandi umhvørvisspurningar,

og av hesi orsøk er av almiklum týdningi, at vit styrkja enn betur okkara treystu bond.

Vit fegnast um, at handils- og viðskiftasamstarvið millum Ísland og Føroyar hevur vaksið so við og við, og at sterkar fyritøkur, handislketur og fíggjarstovnar hava á henda hátt gjørt ein vørr.

Vit síggja eisini, hvussu bondini okkar millum birta upp undir mentan og list. Íslendingar hava við stoltleika fylgt við, hvussu Norðurlandahúsið í Føroyum er vorðin ein umráðandi mentunarpallur, og stórtøkin bókaútgáva Emils Thomsen her í Føroyum, hevur havt íslendskan prentídnað sum grundvøll. Føroysk skøld eru høgt í metum í Íslandi og føroyskar bøkur eru at finna í nógvum íslendskum heimum, har tær verða mettar sum ein felags ættarsøga. Íslendsk skøld hava verið væl móttikin í Føroyum, og tit hava víst teimum virðing, sum vit vilja takka fyri.

Hvussu vignast hevur hesi rívliga túsund árini her norðuri í Atlantshavinum, í Føroyum og Íslandi, er í roynd og veru eitt slag av ævintýri, og vit taka stinnari og betur reivaðir ímóti framtíðini enn fyrr. Hóast summi tíðarskeið hava verið strevin, hevur lagnan í longdini verið okkum til vildar .

Móttøkan her í Føroyum hevur víst okkum íslendingum enn eina ferð, at vit verða mettir sum landsmenn, og eg takki Føroya løgmanni, øðrum leiðarum og øllum føroyingum fyir gestablídni og vinarlag.

Tað er dýrabart fyri íslendingar at eiga føroyingar sum vinir í serflokki, og eg vóni, at vit kunnu halda á at vera tykkum stuðul og hjálp, tá ið á stendur.

Kæru gestir, eg fari at biðja øll reisast og heiðra ta føroysku tjóðina, og samstundis vil eg takka løgmanni fyri stórfingið gestablídni og vinarlag, ið stingur djúpt.

Heiðrað verði tann føroyska tjóðin!